# Tey vælbjargaðu í Føroyum sleppa at renna undan teimum lágløntu

**– Samgongan hevur enn einaferð víst, at hon ætlar at gera gjónna ímillum tey vælbjargaðu og tey lágløntu enn djúpari enn hon er og tað mugu vit berjast ímóti, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag**

SAMHALDSFASTI OG SKATTALÆTTI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*– Hetta er eitt dømi um, at tey klóku í samgonguni hava lumpað tey knapt so klóku, sigur Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag*

– Hetta líkist ongum!

Hans Joensen, formaður í Havnar Arbeiðsmannafelag, er ógvuliga misnøgdir, nú vandi er fyri, at samgongan ikki ætlar at lata inngjaldið til Samhaldsfasta eftirlønargrunnin hækka næsta ár, so at útgjaldið úr grunninum eisini kann hækka.

Men hann leggur afturat, at hetta er bara aftur eitt dømi um, at samgongan er til reiðar at lata tey vælbjargaðu í leggja tey lágløntu longur og longur afturum.

Hans Joensen hevur mangan tosað um, at hann góðtekur ikki, at vit føra ein politikk, sum ger gjónna ímillum tey við høgari løn og tey við lágari løn, enn djúpari enn hon er í dag

Men hann sigur, at júst hetta er eitt gott dømi um, at samgongan førir ein politikk, sum miðvíst ger gjónna ímillum tey háløntu og tey lágløntu í Føroyum bæði djúpari og breiðari enn vanligt.

– Ætlanin at styrkja tann Samhaldsfasta fyri at bøta um pensjónirnar, er ein handil, sum javnaðarflokkurin gjørdi við fólkaflokkin og sambandsflokkin aftur fyri at góðtaka ein skattalætta til tey vælbjargaðu.

– Samstundis verða meiri og meiri avgjøld løgd á løntakaran, bæði vegskattur, barnasburðargrunnur, umframt avgjøld á ymsar vørur.

– Men endar tað nú kortini við, at Samhaldsfasti ikki verður styrktur, er eitt dømi um, at tey klóku í samgonguni hava lumpað tey knapt so klóku, tí so hevur javnaðarflokkurin latið seg draga upp á tráð av hinum báðum flokkunum.

### Ein vanlukka fyri verkafólk

Hans Joensen vísir á, at tey, við góðum inntøkum, hava sjálvandi betri ráð til at gjalda økt avgjøld enn tey, við lágum inntøkum og tí vendir hesin politkkurin tann tunga endan niðureftir.

– Tá ið talan er um avgjøld, verður sama upphædd tikin frá øllum. Tá verður avgjaldið ikki roknað í prosentum av inntøkuni og tí raka avgjøld tey lágløntu meint.

– Samstundis hava tey lágløntu lítlar og ongar møguleikar at spara til sínar egnu eftirlønir.Tað hava tey háløntu góðar møguleikar til. Harafturat eru røddir frammi um at skerja vanligu fólkapensjónina og summi vilja enntá hava hana heilt avtikna.

– Tí hava vit lagt ógvuliga stóran dent á, at styrkja tann Samhaldsfasta fyri at tryggja verkafólki eina hampiliga pensjón. Sostatt er tað onki minni enn ein vanlukka fyri vanliga verkafólkið, um samgongan nú eisini loypir frá avtaluni um at styrkja tann samhaldsfasta, sigur formaðurin í Havnar Arbeiðsmannafelag.

Hans Joensen sigur, at fakfeløgini mugu gera vart við seg hjá politiska myndugleikanum fyri at mótmæla og fyri at royna at beina viðurskiftini aftur á beint.

## Skattalætti ella endurgjald

Sum vit nevndu í Sosialinum týsdagin og í gjár, hevur samgongan avtalað at lækka skattin 60 milliónir um árið. Samstundis hevur samgongan avtalað, at Arbeiðsmarknaðareftirlønargrunnurin, vanliga nevndur Samhaldsfasti, skal styrkjast, so at útgjaldið longu í 2007 kemur upp á 1900 krónur um mánaðin. Í løtuni er tað góðar 900 krónur og leypir samgongan frá avtaluni, kann tað sostatt merkja í ringasta føri, at pensjónistar kunnu missa slakar 1000 krónur um mánaðin í pensjón.

Men samgongan hevur samstundis gjørt greitt, at avtalan um skattalætta og avtalan um Samhaldsfasta, hanga saman. Verður annað framt, skal hitt fremjast eisini. Men verður annað slept, skal hitt sleppa eisini.

Og tað er júst her, at hundurin liggur grivin.

Næsta ár er ætlanin at lækka landsskattin 60 milliónir. Men spurningurin um talan er um ein skattalætta eftir samgonguavtaluni ella um talan bara er um endurgjald til kommunurnar og skattgjaldaran fyri at yvirtaka barnaverndarøkið og barnaburðargrunnin frá landinum.

Tí hevur ivi tikið seg upp um samgongan fer at styrkja tann Samhaldsfasta og tað er hetta, sum elvir til misnøgd hjá fakfeløgunum.

---

# Nú eru skipini hjá Strandferðsluni longu aftur í vanda fyri at verða løgd

**Bæði í næsta mánað og í desember, kunnu skipini hjá Strandferðsluni verða løgd av arbeiðssteðgi**

ARBEIÐSSTEÐGUR OG STRANDFERÐSLA

*Àki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*



*Politikarar hava lovað at skipini hjá Strandferðsluni skulu ikki einaferð afturat verða løgd av arbeiðssteðgi. Men teir skulu sanniliga skunda sær, tí tí gongur heilt galið er vandi fyri, at skipini verða løgd, bæði í næsta mánaði og í jólamánaðinum. Og so liggja bæði Smyril og hini skipini og so er útjaðarin aftur avskorin frá meginøkinum*

Tað elvdi til rættiliga stóra misnøgd, tá ið skipini hjá Strandferðsluni vórðu løgd av tí at Starvsmannafelagið var í arbeiðssteðgi.

Tað elvdi til so stóra misnøgd, at politikarar hava lovað, at tað skal ikki henda aftur, at skipini hjá Strandferðsluni skulu verða løgd orsaka av arbeiðssteðgu.

Men skulu teir veita fulla trygd fyri, at tað lyftið verður hildið, skulu teir sanniliga skunfa sær.

Tí longu um 14 dagar kann tað henda aftur, at skipini hjá Strandferðsluni verða løgd av arbeiðssteðgi. Og fyri at tað ikki skal vera lygn, kann tað henda einaferð afturat í desember.

Tað er ikki meiri enn ein vika síðani, at Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið gjørdu semju, sum fekk enda á arbeiðssteðginum, men longu í næstu viku skulu Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið undir samráðingar um nýggjan sáttmála.

Talan er um sáttmálan hjá maskinmeistaraunum hjá tí almenna.

Sostatt er talan um maskinmeistararnar, sum sigla við Strandferðsluni, við Magnusi Heinasyni og teir, sum arbeiða hjá tí almenna á landi.

Harafturat eru maskinmeistarararnir hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni gjørdir til tænastumenn, so teir kunnu ikki fara í verkfall, men eisini teir skulu hava nýggjan sáttmála.

Sáttmálin ímillum Maskinmeistarafelagið og Fíggjarmálaráðið fór úr gildi 30. september, men er longdur til 31. oktober.

Gongur sum ætlað, skulu partarnir sostatt til samráðingarborðið í næstu viku.

Enda samráðingarnar ikki við semju, liggja Strandfaraskipini aftur og útjaðarin verður avskorin frá meginøkinum.

Men longu í desember er vandi aftur á ferð. Tá skulu Skipara- og Navigatørfelagið og Fíggjarmálaráðið til samráðingar um nýggjan sáttmála fyri Skipararnar og stýrimenninar hjá Strandferðsluni, Magnusi Heinasyni og teimum, sum sigla við Vaktar- og Bjargingartænastuni.

Eisini tann sáttmálin gekk út 30. september, men hann er útsettur til 22 november.

Enda tær samráðingarnar heldur ikki við semju, ja, so liggja skipini hjá Strandferðsluni einaferð afturat.

Gongst heilt illa, kann tað sostatt henda, at skipini hjá Strandfersðluni verða løgd tvær ferðir afturat, hetta til jóla.

### Væntar semju, men alt kann henda

Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara- og Navigatørfelagnum væntar ikki at samráðingarnar fara at enda við arbeiðssteðgi.

Hann væntar, at sáttmálin fer at verða áleið á sama støði sum Starvsmannafelagið, men onkrar dagføringar skulu gerast. Annars hava skiprarnir og stýrimenninir við Teistanum bara ein fyribils sáttmála og har ætlar felagið at fáa ein varandi sáttmála.

Men hóast Ellintur Abrahamsen væntar, at samráðingarnar enda í sátt og semju, so leggur hann kortini afturat, at táið talan er um fíggjarmálaráðið, kann roknast við øllum.

– Tá ið Fíggjarmálaráðið kann finna uppá at leggja alt landið lamið fyri 0,1%, so kunnu vit rokna við øllum, leggur hann afturat.

Hann sipar til samráðingarnar við Starvsmannafelagið, har fíggjarmálaráðið vrakaði eitt semingsuppskot, sum gav 1,0% í lønarhækking, men eina viku seinni góðtók eitt uppskot, sum gav 0,9% í lønarhækking.